# yndina



*Tað stóð mangan hart á í føroysku verjuni, men kortini hevði Jákup Mikkelsen merkisvert lítið at gera*
*Mynd: Reuters*

harðari, so kundi okkurt eisini spurst burtur úr hesum.

Mál komu tó ikki, og spakuliga fóru føroyingarnir av álvara at møðast. Mongu hitastigini og til tíðir høga leikferðin hevði at kalla mergsoðið allan mátt úr okkara monnum, og fyri tað nógva tóktist tað bara vera ein spurningur um tíð, áðrenn leiðslan varð økt. Og tíðin til hetta var í yvirtíðini. Føroyingarnir megnaðu ikki at rudda burtur, og tá Benayoun, sum aftur hesa ferð var besti maður á vøllinum, í aðru atløgu legði innfyri, kundi innskifti Michael Zandberg prika bóltin millum beinini á Jákupi Mikkelsen.

Tað líktist aftur eitt av teimum so væl kendu heiðurligu tapunum, og tað bleiv tað sum so eisini. Men føroyingarnir syrgdu tó fyri, at tapið varð enn meira heiðurligt, og at Henrik Larsen loksins fekk orsøk at fegnast um eitt mál. Eftir at hava givið bóltin upp, sendi Ingi Højsted langt fram til Símun Samuelsen. Hann var staddur langt úti í borðinum, men tá eingin spælari var komin niðan í brotsteigin, langaði vágbingurin bara til við uttaru-síðuni, soleiðis at bólturin skrúvaði móti nærmasta horninum, har málverjin bert megnaði at skumpa hann seinasta pettið í netið.

## Breiddin er styrkt

Saman um tikið gjørdist talan soleiðis um eitt hampuliga gott farvæl til landsliðsvenjaran seinastu trý árini, og sjálvur kundi hann helst eisini staðfesta, at framda arbeiðið hevur verið á eini leið.

Ikki minst, tá hugsað verður um, hvussu fráverulistin undan dystinum í Tel Aviv sá út. Todi Jónsson, Súni Olsen og Jákup á Borg eru allir meira ella minni berandi spælarar á liðnum, men hvørgin teirra var hesa ferð við. Hartil kann so leggjast, at eitt nú John Petersen og Pól Thorsteinsson nú hava biðið landsliðnum farvæl, meðan Julian Johnsson er langtíðarskaddur. Tað vil við øðrum orðum siga, at av føstu spælarunum fyri bara einum ári síðani, er góður helmingur ikki tøkur longur, og tað hevur sett krøv til nýggju kreftirnar. Og hóast hesar fyri tað nógva eru óryndar, so prógvaðu teir - saman við teimum gomlu - at knotur eru í føroysku spælarunum. Og at tað heldur ikki næstu undankapping verður talan um nakran lættan dyst, tá Føroyar standa hinumegin.

## Fakta um dystin

**Ísrael-Føroyar 2-1 (1-0)**
*HM-undankappingardystur á Ramat-Gan Stadion, Tel Aviv*
**31.500 áskoðarar**
**1-0**: Yossi Benayoun, 1.
**2-0:** Michael Zandberg, 90.
**2-1:** Símun Samuelsen, 90.
**Ísrael:** 1. Nir Davidovic - 2. Alon Harazi, 3. Tal Ben Haim, 6. Adoram Keisi - 10. Walid Badier, 17. Abas Suan (18. Michael Zandberg, 46.), 8. Avi Nimni (liðformaður) - 20. Yaniv Katan (7. Pini Balili, 73.), 12. Ormer Golan (14. Shlomi Arbeitman, 66.), 15. Yossi Benayoun
**GK:** Pini Balili, 74., Adoram Keisi, 77.
**Á beinkinum uttan at koma inn:** 22. Ohad Cohen, 5. Shimon Gershon, 11. Idim Tal, 21. Klemi Saban
**Venjari:** Avraham Grant
**Hjálparvenjari:** Moshe Sinai
**Málmansvenjari:** Alexander Obarov
**Fysiskur venjari:** Avi Moyal
**Lækni:** Mark Rosnovsky
**Fysioterapeutur:** Shmulik Rozenzweig
**Liðleiðari:** Israel Schuzinski
**Føroyar:** 1. Jákup Mikkelsen - 3. Mortan úr Hørg, 13. Óli Johannesen (liðformaður), 5. Jón Rói Jacobsen, 4. Johan Byrial Hansen (2. Atli Danielsen, 15.) - 7. Fróði Benjaminsen - 9. Christian Høgni Jacobsen (Símun Samuelsen, 80.), 14. Ingi Højsted, 6. Rógvi Jacobsen, 10. Claus Bech Jørgensen - 11. Andrew av Fløtum (12. Jónhard Fredriksberg, 66.)
**GK:** Fróði Benjaminsen, 40., Ingi Højsted, 68., Óli Johannesen, 71., Atli Danielsen, 76.
**Á beinkinum uttan at koma inn:** 16. Jens Martin Knudsen, 8. Heðin á Lakjuni, 27. Pauli G. Hansen, 18. Bergur Midjord
**Venjari:** Henrik Larsen
**Hjálparvenjari:** Jógvan Martin Olsen
**Lækni:** Jens Pauli Marstein
**Fysioterapeutar:** Álvur Hansen og Øssur Steinhólm
**Liðleiðarar:** Birgir Hansen, Per Olsen og Bárður Olsen.
**Dómarabólkur úr Eysturríki:** Bernhard Brügger, Norbert Schwab, Andreas Fellinger, Fritz Stuchlik
**Dómaraeygleiðari úr Ungarn:** Milos Nagy
**FIFA-umboðsmaður úr Grikkalandi:** Emmanuel Manos Mavrokoukoulakis